# Bygma keypt Balslev

**Bygma hevur keypt Balslev fyri á leið ári síðani, men talan er tó um sama handil, sum føroyingar hava kent í mong ár**




Fyri á leið ári síðani keypti Bygma partabrøvini í fyritøkuni Balslev. Navnið er nú Bygma Balslev, men annars eru ikki stórvegis broytingar. Fyritøkan er enn sami dygdargóði veitarin, tá tað kemur til alt innan timbur, og byggibúðin er óivað millum tær fremstu av sínum slag í landinum.

## Søguligt virki

Virkið er søguligt, og føroyingar hava kent virkið í mong ár. Søgan í stuttum:

Í 1906 stovnaðu tveir ungir menn, Harra Balslev og Harra Goos, umboðsvirki í Keypmannahavn. Goos fór til Føroyar og Íslands fyri at knýta handilssambond, og millum annað grundløgdu teir á Siglufirði Íslands fyrstu sildaolju verksmiðju. Hugsan teirra var at stovna eitt firma nakað sum Østasiatisk Kompagni og Det Baltiske Kompagni, um ikki so stórt sum tey. Virksemið skuldi serliga vera í teimum norðatlantisku londunum. Hetta gjørdist so við og við til stórt og heldur fløkt handilsvirksemi,sum fyri ein part mátti lúta fyri tí stóru niðurgangstíð, ið kom aftan á fyrra heimskríggj.

Hetta var støðan, tá ið Jørgensen, stjóri, í 1927 varð sendur til Føroyar at lata deild upp her. Tað varð byrjað í smáum, í einum høli á Hotel Thorshavn.

Seinni fekk fyritøkan hølir í Vágsbotni, og var har til mitt í 30-unum, tá ið stórur goymslu og skrivstovu-bygningur varð bygdur á tí nýggju bryggjuni við Eystaru vág. Virksemið øktist nógv hesi árini við heilsølu, kol- og timburhandli, og seinni legðist virksemi í samband við fiskiskap aftrat.

Nakað av kiparakstri er eisini partur av søguni, men tað lata vit liggja hesaferð.

Í 1979 flutti timburhandilin niðan til Hoyvíkar í ein 3000 fermetrar stóran bygning á einum 10.000 fermetrar stórum øki. Seinni, í 1989, lat á sama stað Føroya fyrsta byggibúð upp við 1.500 fermetrar. Í ár 2000 vórðu 5000 fermetrar keyptir aftrat, soleiðis at nú hevur virkið eitt øki upp á 15000 fermetrar.

Í 2002 tók Balslev ein nýggjan goymslubygning í nýtslu. Bygningurin er 1.300 fermetrar stórur, og verður brúktur til vørumóttøku og goymslu av timbri, plátum og øðrum byggitilfari.

Í 2003 varð grannaognin sunnanfyri verandi øki keypt. Økið er 4000 fermetrar við tilhoyrandi bygningi á 600 fermetrar

Í 2004 keypti Balslev økið vestanfyri. Hetta økið er umleið 5000 fermetrar. Ætlanin er at brúka økið sum goymsluøki til bingjur, betonggóðs og annað.

Samanlagt hevur Balslev sostatt eitt samlað øki á umleið 24000 fermetrar . Av hesum eru umleið 6.500 fermetrar undir taki

Balslev, sum í dag ger seg galdandi sum eitt sera tíðarhóskandi og leiðandi virkið á sínum vinnuøki, gevur arbeiði til 40-45 fólk (heiltíðarstørv), og komandi miðvísar íløgur fara framhaldandi at tryggja felagnum eina sterka støðu í føroyskari byggivinnu.

## Ekort

Hjá Balslev ber eisini til at nýta ekort, og harvið fáa teir vørurnar fyri serprís, og fyrimunir, sum hetta annars gevur. Fyritøkan hevur havt meira sølu við ekortinum, enn væntað. Teir meta hetta sum eitt gott hugskot og gott tiltak.





